Summar FESTIVALUR - har hittini hittast



FESTIVALTÍÐINDI við Ragnhild Ellingsgaard

Guðrið Hansdóttir á Summar Festivalin:

# Feitt at spæla á SF!







*Guðrið Hansdóttir verður aftur í ár at hoyra á Summar Festivalinum*

*Myndir: Heiðrikur av Heygum*

**Fantastiska Guðrið Hansdóttir, sum í summar hevur givið nýggja fløgu út, verður aftur at hoyra í Flags-tjaldinum í ár. Hetta er fjórðu ferð, at hon verður við á Summar Festivalinum**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Songkvinnan við gyltu røddini og teim frálíku løgunum gav í juni út aðru fløgu sína við heitinum "The Sky Is Opening". Fløgan er merkt av heldur glaðari og lættari tónum enn tey løgini, sum vit kenna frá fyrru útgávuni "Love Is Dead". Nógv hevur verið skrivað um orsøkina til hesa broyting, men hjá Guðrið sjálvari er orsøkin tó heilt einføld:

- Eg eri enn akkurát tann sama sum á fyrru útgávuni. Beint nú hevði eg bara meira hug til at spæla glaðan og lættan popptónleik. Tað fellir mær so lætt í løtuni, so hetta bleiv úrslitið, sigur hon.

Hetta er fjórðu ferð, at Guðrið Hansdóttir verður við á Summar Festivalinum. Fyrstu ferð spældi hon við bólkinum Isadora & The Rebels, meðan hon hini árini hevur staðið á palli í Flags-tjaldinum við bólki undir hennara navnið.

- Fyrstu ferð, eg spældi á SF, var eitt hóskvøld áðrenn festivalurin ordiliga var byrjaður. Tað var ordiliga feitt og stuttligt; eitt sindur eitt upphitingarkvøld, har vit og m.a. Budam spældu í Húsinum fyri fólki, sum lógu og sótu á gólvinum, minnist Guðrið aftur á løtuna.

Hetta var árið, tá mjørkin legði seg yvir festivalin sum ein tjúkk dýna og seinkaði allari flogferðslu, so at útlendsku gestirnir nærum ikki mundu vunnið vegin fram til pallin.

- Løgið nokk, so minnist eg slett ikki mjørkan sum nakað keðiligt. Eg minnist bara hetta lekra veðrið og vinfólkini, sum eg var saman við. Minnist, at vit hildu til hjá eini vinkonu í ovaru hæddini á súklihandlinum og bara høvdu tað fantastiska hugnaligt saman, sigur Guðrið og leggur tó afturat, at besta upplivilsi fekk hon seinasta summar.

- Mítt besta upplivilsi á SF var heilt sikkurt seinasta summar, tá eg spældi fyri næstan fullum tjaldi. Stemningurin var fantastiskur og øll sungu við á løgunum – so vónandi verður tað eins stuttligt í ár, heldur hon og leggur afturat, at júst hesin pallurin er eitt ordiliga hugnaligt stað at framføra á.

Móttøkan av nýggju fløguni hevur verið heilt framúr góð og sást hetta skilliga aftur á teim útseldu útgávukonsertunum hjá Guðrið fyri stuttum. Tí kann Summar Festivalurin heldur ikki annað enn fegnast um enn einaferð at hava fingið fatur á mest aktuellu songkvinnuni í Føroyum í løtuni.

Um nakrar vikur kemur hon so aftur á pall í Klaksvík og tá kunnu vit vænta at uppliva eina songkvinnu, sum veruliga vil gera sítt allarbesta fyri at geva fólki nakað at minnast til.

- Nýggju løgini eru alt ljósir tónar, sum ein verður glaður av at hoyra. Saman við bólkinum (sum verður tann sami sum á fløguni) lova vit tykkum eina feita og lívliga framførslu, har fólk sleppa at syngja við og hava tað gott. Vit hava spælt rættiliga nógv í summar og eru tí í toppformi – og hetta skal bæði hoyrast og síggjast á SF, lovar Guðrið Hansdóttir, nú dagarnir av álvara eru farnir at styttast til ársins festival.



## Túnatos

**Rógvi Jacobsen er 30 ára gamal, timburmaður og frá Klaksvík.**
**Rógvi hevur í fleiri ár spælt fótbólt uttanlanda og hevur tí bara verið á SF eina ferð.**

**1. Ætlar tú tær á SF í ár?**
*Ja, í ár ætli eg mær so heilt sikkurt á SF! Tað er av tí einfaldnu orsøk, at SF hevur verið tann mest spennandi og besti festivalurin, sum hevur verið tey seinastu árini. Eg havi hvørt ár ynskt at verið heima á SG – og nú eri eg her so aftur! :)*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*Haldi ikki, at eg kann taka nakra framum aðrar – men tann besta konsertin, sum eg havi mist – og tað minnist eg best – tað var, tá Scorpions var her. Tá sat eg veðurfastur í Onglandi og kom heim dagin eftir til ein avlýstan festival vegna veður. Tá var Rógvi ikki nøgdur..*

**3. Svevur tú í tjald ella í ordiligari song, tá tú ert á SF?**
*Eg sovi heima hjá mammu og babba, tá eg eri á festival. Tað dámar mær eisini nógv best..*

**4. Hevur tú nakrantíð skora á SF? (altso diddir!)**
*Nei, higartil er tað ikki komið fyri. Men tað kann eisini vera tí at eg so sjálvdan havi verið á festival ;)*

**5. Hvat gleðir tú teg mest til á SF 2009?**
*Haldi, at eg gleði meg mest til at hoyra teir føroysku bólkarnar spæla og syngja – og sjálvandi eisini til eitt skitfult festivaløkið, har øll syngja við. So kann tað ikki blíva perfektur festivalur. Hetta gleði eg meg allarmest til.. ;)*